# Skilaleys koyring endaði á Landssjúkrahúsinum

**Tvey fólk endaðu á Landssjúkrahúsinum eftir vitleysa koyring á Kongabrúnni í Havn um hálvgumtvey tíðina mánanáttina. Tveir bilar komu kappkoyrandi inn móti Café Nátúr, tá annar teirra rendi saman við ein mótkoyrandi bil**

SKILALEYS KOYRING
*Eirikur Lindenskov*
*Sosialurin*

Mánanáttina vórðu tvey fólk flutt á Landssjúkrahúsið eftir eitt ferðsluóhapp á Kongabrúnni í Havn.

Talan var um eitt óhapp, sum átti at henda fyrr ella seinni sum úrslit av skilaleysu koyringini, sum so ofta er at síggja í Havnargøtum um næturnar. Eygnavitni, sum Sosialurin tosaði við, ivaðust ikki í, at talan var um kappkoyring. Tveir bilar komu við nógvari ferð eftir Havnargøtu, fram við »Røntgeni« heim móti Café Nátúr. Annar bilurin fer niðan eftir Kopargøtu, sum er gøtan aftan fyri Café Nátúr. Hini bilurin fer niðan eftir Áarvegnum framman fyri Café Nátúr – har vegurin er einsrættaðar omanaeftir – og har stoytir hann frontalt saman við ein mótkoyrandi bil.

Av løgreglustøðini í Havn verður sagt, at rúsdrekka ikki var uppi í – og vakthavandi kundi ikki vátta ella avsanna, um talan var um kappkoyring. Men hann segði tó, at teir kenna til trupulleikan júst á hesum vegastrekkinum.

Materielli skaðin var stórur, báðir bilarnir fóru illa og vórðu sleipaðir burtur.



*Tað er eyðsýnt, at talan var um sera skilaleysa koyring. Meterielli skaðan á bilarnar var stórur. Førarin á BMW bilinum og eitt ferðafólk í hinum bilinum vórðu flutt á Landssjúkrahúsið*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Virði fyri milliónir upp í royk




*Brannteknikarar frá Ríkispolitinum eru komnir til Føroya at kanna orsøkina til eldsbrunan hjá Damor á Argjum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Handilsbygningurin hjá Damor á Argjum brann í grund sunnunáttina. Virði fyri milliónir fóru fórust í eldinum**

ELDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Kl. hálvgum tvey sunnunáttina fekk Alarm-sentralurin í Havn boð um, at eldur var í handilsbygninginum hjá Damor á Argjum. Tá løgreglan og sløkkiliðið kom á staðið fáar minuttir seinni, stóð allur bygningurin í ljósum loga – og í rapportini hjá løgregluni stendur, at kl. tvey stóð login upp gjøgnum takið.

Hóast kanningar eru gjørdar, so er tað ikki eydnast løgregluni at staðfesta orsøkina til eldin. Tí eru brandteknikarar frá ríkispolitinum komnir til Føroya at kanna eldin.

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur, at tað er vanlig mannagongd at fáa serkøna hjálp til síkt, tá talan er um so stórar eldar, og at tað ikki mistanki um eldáseting, ið er orsøkin til tess.

Sløkkiarbeiðið tók drúgva tíð, og sunnudagin seinnapartin reyk framvegis úr bygninginum.

Virði fyri fleiri milliónir fóru upp í royk í eldinum.



*Bygningurin hjá Damor stóð ikki at bjarga, tá sløkkiliðið kom á staðið. Alt kolaðist upp og virði fyri milliónir eru farin í eldinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Skilaleysa koyringin skal steðgast



*Vegbungur sýnast at minka um ferðina. Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sigur at hann er tilreiðar at taka málið upp í býráðnum um at gera vegbungur til tess at minka ferðina eftir Havnargøtu*

**Rasarakoyring í býnum skal steðgast. Um neyðugt, so skal tað gerast við vegbungum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn**

SKILALEYS KOYRING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Um neyðugt, so skal skilaleysa koyringin í miðbýnum í Havn steðgast við vegbungum. Tað sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í viðmerking til ferðsluóhappið við Café Nátúr mánanáttina.

Í heyst gjørdi býráðið vegbungur við skúlar og barnagarðar í býnum. Endamálið var at minka um ferðina og økja um ferðslutrygdina. Heðin Mortensen sigur, at hetta hevur eydnast væl.

– Tað sigur seg sjálvt, at vit kunnu ikki góðtaka, at rasarakoyring fer fram í gøtunum um náttina. Um bilførararnir ikki skilja hetta, so eri eg tilreiðar at taka málið upp í býráðnum um at gera vegbungur framman fyri hjá Niels Arge og oman fyri Café Nátúr, sigur Heðin Mortensen.